# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

30. desember fingu Marita og Súni Poulsen, Hvalba, ein son. Hann var 47 cm langur og vigaði 2810 gr.

5. januar fingu Jóna Vejhe, Porkeri, og Hjørleif Hansen, Tjørnuvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3630 gr.

14. januar fingu Rúna og Heðin Lamhauge, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

15. januar fingu Rafik og Samia Bourbiaa, Søldarfjørður, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3100 gr.

17. januar fingu Bjarta og Kartin av Húsabrúgv, Argir, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4200 gr.

18. januar fingu Oddbjørg og Jógvan Magnussen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3800 gr.

19. januar fingu Annika og Heðin Weihe, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

19. januar fingu Ansa Stacey Højgaard og Fróði Jákupsson Lamhauge, Glyvrar, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3600 gr.

## Merkisdagar

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 23. jan. fyllir Tummas Lauritsen seksti. Dagurin verður hildin við hús á Tvørgarði 31 í Miðvági frá kl. 18. Vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Sunnudagin 24. jan. verður Kjartan Stakksund, Eiði, 80 ár. Dagurin verður hildin við altargangsgudstænastu í Eiðis kirkju kl. 17. Síðani verður døguri í Ítróttarhøllini har øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
1. feb. verður Hans Poulsen, Hans av Eiði, 80 ár. Dagurin verður hildin 6. feb. hjá dótturini í Kristiansgøtu 37, Hoyvík, frá kl. 17.

**90 ára føðingardagur**
Hósdagin 28. jan. fyllir Eigil Gunnarsson í Havn 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í hølunum hjá Starvsmanna-felagnum, J. H. Schrøtersgøta. 9, frá kl. 16-20, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. feb. hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. feb. frá kl.18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 23. jan. kl. 15 giftast í Hoyvíkar Kirkju Tóra Simonsen, Saltangará, og Herbert í Lon Jacobsen, Hoyvík. Vælkomst verður heima við hús frá kl. 19, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 6. feb. giftast Niza Pardillo, av Filipsoyggjunum og Hans Hilmar Johannesen av Toftum. Vækomst verður á Svangaskarði kl. 19. Tey, í ynskja, at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um, at siga frá á tlf. 748134/448134 innan 2. februar.

**Prógv**
Tann 20. jan. 2009 var Jóanes Reinert, Tórshavn, útlærdur sum hotelkokkur. Læruplássið var Restaurant Salt á Admiral Hotel í København.

**Prógv**
Durita Waagstein, Tórshavn, hevur tann 18. januar lokið prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur á Fredriksborg Amtssygehus í Hillerød.

## Minningarorð um mammu okkara

# Honnu E. W. Jacobsen

**f. 24. jan. 1953 d. 23. sept. 2009**



*Hanna, Súsan og Elin*

*Ein syrgir tí, ein hevur elskað.*

Nú jólini eru farin afturum og eitt nýtt ár er byrjað, er trupult at síggja ljósið hinumegin tunnilin. Tunnilin, sum vit skula í gjøgnum, tá vit hava mist, sorgin. Mamma hevði blivið 57 ár 24. januar. Hetta var ikki ein marrudreymur, men veruleikin.

Tá ið vit tann 22. september settu okkum í flogfarið heim til Føroya, vistu vit ikki at vit fáar tímar seinni skuldu halda mammu okkara í hvør sínari hond og siga farvæl. Mamma hevði vikuna framman undan verið í Keypmannahavn. Vit vóru saman við henni og Árna og tosaðu um at halda jól saman. Og nú skulu vit ongantíð tosa við hana aftur. Mamma fekk staðfest krabbamein. Fekk tikið tað burtur, men doyði av eftirvið-gerðini. Meiningsleyst, alt stóð stilt. Árni, sum hevði verið saman við henni ígjøgnum alla sjúkraleguna, var staddur í Norðurnorra og vit í Føroyum. Tað komu blómur, fólk, brøv, sms, telefonuppringingar, jarð-arferð, sálmar, ervið og vit gjørdu ikki annað enn at siga takk.

Komnar niður aftur til Keypmanna-havnar var alt broytt. Gøturnar sóu øðrvísi út, larmurin var harðari, buss-skýlini vóru størri, kaffi smakkaði ikki tað sama. Kenslurnar lógu utt-aná. Hetta var ein nýggjur heimur, vit passaðu ikki inn aftur. Veruleikin var at alt er tað sama, men vit vóru broyttar. Eingin mamma sum ringdi meira sjálvt um hon stóð á Skype. Urtapotturin sum hon keypti stóð í vindeyganum, troyggjan hon bant lá í skápinum. Handilin sum vit keypti klæðir í liggur har enn, men klæðini lógu á stólinum hjá henni í Suðuroy. Caféin í Nyhavnini, sum vit ótu á í summar er eisini har enn, men nú er vetur, og mamma er ikki her meiri. Nú er alt bara minnir og sorg.

Myndirnar í myndatólinum úr Suð-uroy í summar, kanalrundfart í Keyp-mannhavn, jarðarferðini hjá Bakk-ommu í vár, alt minnir. Vit hugsa eisini um teg Árni, sum livdi títt lív saman við mammu og sum var so langt burtur, tá tú brádliga misti hana. Sorgin ger okkum einsamøll, tí ein sleppur ikki av við hana. Vit syrgja, tí vit hava elskað mammu. Vit syrgja, tí tað at missa mammu soleiðis gevur onga meining. Vit syrgja tí vit sakna hana, og tí okkara tilvera er so ómetaliga nógv broytt eftir hetta. Tað er bert tíðin sum kann lekja sorgina. Mamma vil altíð vera hjá okkum í minninum, og tí vit eru ein partur av henni. Sorgin er ikki ein sjúka, men ein partur av lívinum. Vit halda at vit hava tíð, men eingin hevur nokk av tíð. Vit skula ikki liva ævigt, vit skula liva nú. Vónandi kann sorgin hjálpa okkum at búnast og at skilja júst hetta. At vit skula liva nú.

Hvíl í friði mamma.

**Súsan og Elin**

## Prógv

Tann 5. des. 2009 fekk Annbjørg Abrahamsen úr Fuglafirði prógv í arbeiðs-sálarfrøði, Master of Science in Occupational Psychology „with merit" á Goldsmiths University of London.



## Dagurin

22. januar. Vincentius, deyður umleið ár 300 í Zaragoza. Píndur til deyða undir Diocletianus keisara. Navnið er laninskt og merkir hin sigursæli.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

